## DAGSINS MEINING

# Løgin atburður

Tað er ein løgin atburður, ið danska stjórnin sýnir í málinum um uttanríkispolitisku heimildirnar. Stjórnin veit fullvæl, at landsstýrið er alt annað enn fegið um grønlendska modellið. Stjórnin veit eisini, at Føroya landsstýri ikki kann góðtaka tær avleiðingar, ið grønlendsku heimildirnar kunnu koma at hava fyri Føroyar. At grønlendingar lata sær lynda, at heimildirnar verða avmarkaðar, er teirra avgerð. Hetta kann okkara landsstýri ikki leggja seg út í og hetta eigur landsstýrið tískil ikki at leggja seg út í. Hinvegin kann landsstýrið ikki góðtaka, at danska stjórnin við at leggja grønlendsku heimildarlógina fram júst nú leggur forðingar út fyri eini skilagóðari føroyskari loysn.

Tað er einki minni enn ein provokatión frá danskari síðu at leggja grønlendska uppskotið fyri fólkatingið nú og tað áðrenn samráðingar hava verið við Føroya landsstýri. Grønlendska uppskotið hevur ásetingar og avleiðingar, sum føroyingar ikki kunnu góðtaka. Hesar ásetingar snúgva seg eitt nú um, at grønlendigar og føroyingar skulu vera samdir um ávís mál, áðrenn avgerð kann verða tikin um hesi mál. Hetta ber ikki til! Hetta er beinleiðis ósømiligt og vekir minni um hjálandatíðina!

Hvat fer nú at henda? Danska stjórnin hevur borið so í bandi, at bert tveir kostir eru í at velja: Tann fyrri er, at vit góðtaka ein loysn, ið minnir um ta grønlendsku loysnina. Hin kosturin er, at Føroyar fáa betri sømdir enn Grønland. Slíkt er hent áður, eitt nú í undirgrundarmálinum. Hetta er sostatt møguligt, men hetta er ikki gott fyri ríkisfelagskapin. Hetta eru gamlar hjálandasnildir: *Divide et impera! Del og hersk!* Á hendan hátt setir danska stjórnin kílar i tey annars sera góðu viðurskiftini millum Grønland og Føroyar. Hetta er lítið sømiligt fyri land, ið skal eitast at teljast millum fremstu demokratisku tjóðir í heiminum. Hetta sømir seg ikki landi, ið metir seg sum fyrimynd, tá tað ræður um at virðiliga viðgerð av fyrrverandi hjálondum. Hesin atburður gagnar ikki ríkisfelagskapinum, tí hesin atburður avdúkar, at danska stjórnin metir ikki Grønland og Føroyar sum javnlíkar partar av ríkisfelagskapinum. Landsstýrið eigur ikki at góðtaka henda atburðin hjá donsku stjórnini. Landsstýrið eigur at halda fast um føroysku krøvini, og so má landsstýrið taka sær ta tíð, ið krevst. Stjórinin hevur nú sett landsstýrið undir trýst. Møguliga er hetta tilvitað - møguliga av kleyvarskapi. Sama ger - nú er at halda fast og ikki at slaka ein tumma.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningarnir eru einasta demokratiska leivdin

**Finnur Helmsdal,**
*tingmaður*



Kári á Rógvu, løgfrøðingur sigur við Útvarpið mánadagin, at fyrispurningar, sum tingmenn seta landsstýrismonnunum eru ov tíðarkrevjandi og ein beinleiðis forðing fyri útinnani av demokratinum í politiska arbeiðinum.

Nú skal eg ikki ditta mær at greiða skrivaranum í Grundlógarnevndini, frá demokratisku viðurskiftum okkara. Men eg tori at siga, at handan viðmerkingin hjá Kára á Rógvu var nokk so nógv við síðuna av.

Tað er nevniliga soleiðis fatt á Føroya løgtingi, at skiftandi samgongur hava niðurprioriterað demokratiið rættiliga nógv, og vit kunnu siga, at tær seinastu samgongurnar hava verið samdar um at flyta demokratiið úr tingsalinum í okkurt samgonguhøli.

Andstøðan hevur í nógv ár verið so dyggiliga hildin uttanfyri, og hóast núverandi løgmaður sum andstøðuleiðari átalaði slíkt harðliga, so er ongan tíð so illa statt, sum júst nú. Seinasta dømi um hetta er, at landsstýrismaðurin í almanna- & heilsumálum heldur bjóðaði pressuni enn andstøðuni við til eina gjøgnumgongd av lógaruppskoti um ílegugranskingar. Og tað er kanska enn eitt dømi um, at demokratiið er seyðrað úrturúr tingarbeiðinum, nevniliga at stóru bløðini eru eitt við samgonguna.

Nei, Kári á Rógvu, kanska taka fyrispurningarnir tíð, men teir eru í dag einasta trygdin fyri, at nakað av demokratiið er innan okkara tinggátt. Fyrispurningarnir tryggja, at mál verða tikin upp. Teir tryggja, at ávíst orðaskifti fer fram á tingi, og teir geva einum kensluna av, at Føroya løgting ikki er ein 100% afturlatin losja, har andstøðan als onga atgongd hevur. Men verða fyrispurningarnir avmarkaðir ella avtiknir, so kann verða, at Jóannes og teir megna at fullgera verkið.

Skal leggja afturat, at tað hevði verið pínliga lítið at gera í tinginum, um ikki munnligir fyrispurningar vóru á skrá hvønn mikudag umframt teir skrivligu. Tá hevði mest sum verið sløkt alla tíðina í tingsalinum.

# Endaðu uttanríkispolitisku heimildir okkara í Nuuk?

**Hergeir Nielsen**



Løgmaður sigur, at Føroyar fara ikki at samtykkja eina heimildarlóg, har Føroyar verða bundnar at grønlendskum viðurskiftum.

Henda niðurstøða løgmans er kortini eingin trygd fyri, at Føroyar ikki verða bundnar at Grønlendskum viðurskiftum kortini.

Um Fólkatingið samtykkir Grønlendsku heimildarógina, verður hon galdandi fyri Grønland og Danmark.

Henda lóg sigur, at Føroyar og Grønland skulu semjast í uttanríkispolitiskum viðurskiftum, og verða føroysk áhugamál tá løgd undir grønlendska lóg.

Talan er um eina longri prosess, har menn hava sitið á ríkisfundum og lagt ætlanir fyri hesum nýggja politikkinum, har heimildirnar at ráða sær sjálvum úteftir skuldu knæsetast.

Føroyar skuldu ikki hava fleiri konfrontatiónir, segði okkara løgmaður, og føroyskur uttanríkispolitikkur verður nú stungin út í kortið av grønlendska landstinginum. Tað hevur longu samtykt nýggju heimildarlógina og noktar at broyta hana aftur.

Løgmaður hevur í øðrum umfari ligið á knæ fyri danska forsætismálaráðharranum og biðið hann um at duga sær hógv og ikki leggja okkum føroyingar í hetta grønlendska hafti, men til fánýtis.

Hann hevur jú sjálvur tosað nógv um ein pragmatiskan poltikk, har ongar konfrontatiónir skuldu vera, og hann situr nú úti á berajóli.

Samráðingartilgongdin um framtíð Føroya á uttanríkispolitiska pallinum var av so lítlum politiskum týdningi, at hon var hildin á embætismannastigi.

Tá hon var at enda komin, var løgmaður Føroya vendur á trappusteininum, og sendur heimaftur sum av torvheiðum, so sum hann eisini sjálvur málbar seg.

Vit, sum undarast yvir hesa margháttligu tilgongd, standa spyrjandi og slotað eftir uttanríkispolitisku heimildum okkara, sum endaðu í Nuuk?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.